umhvørvisstovan

P/F MEST
J.C SVABOSGØTA 31
POSTBOX 65
110 TÓRSHAVN

Argir hin 20. desember 2023
Málsnr.: 21/01240-59
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Suni Petersen

## Góðkenning av broyttari ætlan hjá P/F MEST at gera turrdokk á Skála

Umhvørvisstovan góðkendi hin 27. september 2023 eina ætlan hjá P/F MEST at gera nýggja turrdokk norðan fyri verandi dokk á Skála. Góðkenningin hevði heimild í § 21, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum og støði í umhvørvisárinsmeting av samlaða virkseminum hjá P/F MEST á Skála, t.e. í nýggju turrdokkini, verandi turrdokk, bedingini, smiðjuni o.ø.

Hin 16. november 2023 fekk Umhvørvisstovan nýggja umhvørvisárinsmeting av eini broyttari ætlan, har nýggja turrdokkin verður flutt uml. 50 metrar í ein landnyrðing, t.v.s. út móti sjónum. Samstundis verður bryggjukanturin við ætlaðu turrdokkina fluttur samsvarandi.

Umhvøvisstovan metir, at við at flyta nýggju turrdokkina 50 metrar burtur frá bygdini, verður ávirkanin av óljóði o.ø. ampum frá virkseminum minni enn í upprunaligu ætlanini. Umhvørvisstovan góðkennir tí, at broytta ætlanin hjá P/F MEST at byggja nýggja turrdokk á Skála er fevnd av góðkenningini frá 27. september 2023, j. nr. 22/01240-43, og at ikki er neyðugt við hoyring av nýggju umhvørvisárinsmetingini.

### 1. Broytt ætlanin

Við tað, at dokkin verður flutt 50 metrar út móti sjónum, skal væl minni av gróti spreingjast. Grótið, sum kemur úr nýggju dokkini og annað grót á staðnum, verður brúkt til grótfyllu í nýggju bryggjuni, og verður tí ikki tørvur á at koyra grót burtur av økinum. Væntandi verður heldur ikki tørvur á at koyra grót til í sambandi við arbeiðið. Heldur ikki verður neyðugt at dýpa út fyri munnan av dokkini ella at taka móru og annað tilfar upp av botni, við tað, at tað fer at liggja undir grótfylluni.

Ongar broytingar verða í virkseminum hjá P/F MEST á Skála í sambandi við, at nýggja dokkin verður flutt í mun til upprunaligu ætlanina, og tí metir Umhvørvisstovan, at ávirkan og ampar í bústaðarøkjum nærhendis verða minni enn í sambandi við upprunaligu ætlanina.

### 2. Ávirkan á djóra- og plantulív

Fram við bryggjunum er einki serstakt djóra-, fiska- ella fuglalív. Botnurin fram við bryggjuni er týðiliga dálkaður av tí virksemi, sum hevur verið á staðnum.
Umhvørvisstovan metir ikki, at nýggja staðsetingin av turrdokkini broytir nakað upp á ávirkan á djóra- og plantulív á staðnum.

### 3. Óljóð

Simuleringar av ljóði frá virkseminum í sambandi við upprunaligu ætlanina vísa, at avbjóðingar verða av óljóði, um verandi tøkni verður brúkt, hóast ljóðveggur verður gjørdur millum økið hjá P/F MEST og bústaðarøkir nærhendis. Men um verandi tól verða skift út til tól, sum larma minni, eitt nú elrikin tól heldur enn dieselrikin, vísa simuleringarnar, at til ber at halda markvirðini fyri larm.

Simuleringar av óljóði frá rakstrinum í sambandi við, at nýggja turrdokkin verður flutt, vísa, at markvirðini, við einstøkum undantøkum, verða hildin við verandi tøkni, um ljóðveggur verður gjørdur. Í umhvørvisgóðkenningini verður treyt sett um, at um óljóð verður til ampa og er oman

fyri markvirðið, skulu bøtandi atgerðir setast í verk, eitt nú við at broyta mannagongdir ella at larmandi tól verða skift út við tól, sum larma minni. Eisini verður ein generell treyt um, at P/F MEST altíð skal brúka bestu tøku tøknina fyri at minka um øll árin á umhvørvið, eitt nú, at tá tól verða skift út, skal miðast eftir, at nýggju tólini hava betri umhvørvisligar eginleikar enn tey gomlu.

Nakað av óljóði verður av spreinging og av at seta spunsveggir niður. Spunsjørnini verða ikki sligin niður, men verða sett niður við vibratori, sum larmar væl minni. Hetta arbeiðið fer bara fram um dagin, er tíðaravmarkað og fer bara fram stutta tíð hvønn dag. Tí verður hetta arbeiðið ikki mett at fara at vera til ampa í bústaðarøkjum.

## 4. Ferðsla

Nakað av tungari ferðslu verður í sambandi við at byggja nýggju dokkina, men av tí, at tað hvørki verður neyðugt at koyra grót til ella frá økinum, verður tunga ferðslan væl minni enn í sambandi við upprunaligu ætlanina.

## 5. Grótfylla

Grótið, sum verður sprongt í sambandi við nýggju dokkina, verður brúkt til grótfyllu í nýggju bryggjuni. Spunsveggur verður settur niður, og verður grótið fylt innan fyri spunsveggin. Tí verður ikki roknað við, at møguligar leivdir av spreingileidningum í grótinum spjaðast út á fjørðin. Í umhvørvisgóðkenningini eru treytir um, at um leivdir av spreingileidningum kortini spjaðast í umhvørvinum, skulu tiltøk setast í verk at forða hesum.

## 6. Avgerð

Við støði í umhvørvisárinsmetingini, dagfest 16. november 2023 og samskifti við P/F MEST og ráðgevar teirra, metir Umhvørvisstovan, at ávirkanin á náttúru og umhvørvið av nýggju ætlanini verður minni enn í sambandi við upprunaligu ætlanina. Umhvørvisstovan góðkennir tí, at broytta ætlanin hjá P/F MEST at gera nýggja turrdokk á Skála, er fevnd at góðkenningini frá 27. september 2023, j. nr. 22/01240-43.

Uppskot til góðkenning varð hin 19. desember 2023 send P/F MEST og Runavíkar kommunu til viðmerkingar. Hvørki P/F MEST ella Runavíkar kommuna høvdu nakrar viðmerkingar.

Góðkenningin er treytað av, at verkætlanin verður framd sum greitt er frá í umhvørvisárins-metingini, dagfest 16. november 2023 og øðrum samskifti millum Umhvørvisstovuna og P/F MEST og ráðgevar teirra.

Umframt hesa góðkenning skal virksemið hjá P/F MEST á Skála hava umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.
Í umhvørvisgóðkenningini verða settar treytir til virksemið, eitt nú um spillivatn, óljóð, ljós, um skráseting, innaneftirlit o.a.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til aðrar møguligar góðkenningar ella loyvi sambært aðrari lóggávu.

## 7. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til Umhvørvismálaráðið við neyðugum skjølum.
Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Møgulig kæra skal vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 17. januar 2024.

Sigga Jacobsen, deildarleiðari / Suni Petersen, málsviðgeri